# Broytið so §266b, bispur hevur givið sítt vælsignilsi!

**FLÓVIN EIDESGAARD,**
Vanløse



**Blaðmaðurin roynir at krógva tað niðast í greinini. Og í mansjettekstinum endurgevur hann bara tað, sum bispur sigur talar ímóti at broyta antidiskriminatiónsparagrafina.**

Í Sosialin í gjár er samrøða við Hans Jacob Joensen, bisp, um happing av samkyndum í Føroyum og eina møguliga broyting av antidiskriminatiónsparagrafini. Bispur vil helst ikki nevna fleiri bólkar í paragrafini, men sigur eisini,

»Um tað (verja samkynd ímóti happing, fe) ikki kann gerast á annan hátt, so kundu vit helst skoytt "kynsligur samleiki" uppí lógina.«

Góðu tingmenn, tað er upp til tykkum at meta, um tað er neyðugt at broyta antidiskriminatiónsparagrafina. Men tað er í øllum førum greitt, at Føroya bispur, burtursæð frá nøkrum praktiskum lógartekniskum argumentum, sum ikki er hansara fakøki, einki hevur ímóti at kynsligur samleiki er við í paragrafini.

So eingin orsøk at óttast Guds dóm (*tað er fakøki bisp*) – einans veljarans, men har vil eg mæla tykkum til at lurta eftir Hergeiri Nielsen!

# Sjónvarp Føroya for Dummies

**RICHARD SCHWARTSON**
MSc (Pharm), MSc (Information Systems)



Tað vóru tendensiøs og óseriøs sjónarmið, sum Eir í Ólavstovu saman við einum lívfrøðingi borðreiddi við í prime time í 'mentanartíðindi' fríggjadagin 6. oktober.

Við støði í einum dulnevndum lesarabrævi viðgjørdi hon fyribrigdi religiøs fanatisma og og kristnir fundamentalistar.

Uttan yvirhøvur at siga, hvat hon meinti við, vóðru óhugnaligu heitini religiøs fanatisma, religiøsir fundamentalistar og ekstremistar borin inn í stovuna, sum fekk ein at hugsa um 11. september 2001 og sjálvsmorðsbumbur, har somu heiti verða brúkt um tey, sum framdu illgerðirnar. At brúka slík tokukend og lødd orðafelli, uttan at greiða frá, hvat ein meinar við, elvir til ótrygd og ampa. Hvør er í hugaheiminum hjá vertinum kristin fundamentalistur? Og hvar gongur markið millum at vera ein hóvligur kristin og fundamentalistisk kristin, ella ein hóvligur religiøsur og ein fanatiskur religiøsur?

Verturin hevði fingið ein lívfrøðing at gera sínar viðmerkingar til tokukenda og leysa pástandin:

*'Akademikarar eru ikki vælkomnir í Føroyum, tí tað skal lítið til at verða outsidari her, og hetta kemst av, at tann føroyska mentanin er stýrd av religiøsari fanatismu.'*

Hvussu lívfrøðingurin fekk vavt neo-darwinsmu og religiøsar ekstremistar upp í sendingina er mær óskiljandi. Jóannes Danielsen, lívfrøðingur, skal hava loyvi at koma fram við sínum sjónarmiðum, tá hann vil. Mín viðmerking til sjónarmið hansara er orðini hjá Michael Ruse:

*'we who cherish science should be careful to distinguish when we are doing science and when we are extrapolating from it, particularly when we are teaching our students. If it is science that is to be taught, then teach science and nothing more. Leave the other discussions for a more appropriate time.'*

Eg og nógvir akademikarar við mær taka ikki undir við áskoðanum hjá lívfrøðinginum um, at vísundaligu dátaini vísa á, at alt er íkomið við tilvildarligum mutasjónum og natúrligari útveljing. Vísundaligu dátaini stuðla eins væl tí modellinum, at ein skapari stendur aftan fyri tað sum er. Men soleiðis sum verturin og lívfrøðingurin málbóru seg í sendingini, so manglaði bara at senda mær navnaspjaldrið 'fundamentalistiskur kristin, religiøsur fanatikari og ekstremistur'.

Tað varð nevnt av lívfrøðinginum í sendingini, at vit føroyingar eru til grin í umheiminum, orsakað av okkara fundamentalistisku støðu til uppruna til alt tað sum er, at vit trúgva at ein skapari stendur aftanfyri.

Eg kundi nevnt eina ørgrynnu av útlendskum granskarum og professarum, sum ikki grína at okkara sokallaðu fundamentalistisku støðu, men lat meg avmarka meg til Ole Vang. Ole Vang, PhD, er granskarin og molekylerbiologurin og lektari á RUC (Roskilde Universitetscenter). Ole hevur vísundaliga førleikan at gera sína metan av, um vísundaligu dátaini vit hava vísa á at alt hevur sín uppruna í berari tilvild. Ole Vang er komin til ta niðurstøðu, at ein skapari stendur aftan fyri. Hansara sjónarmið kunnu lesast í donsku Weekend-avisen 15. august 2003 var samrøða við Ole Vang. Greinin hevur heitið 'Biologen der ikke tror på Darwin'

Kringsvarpslógin krevur, at eg skal rinda sjónvarpsgjald. Ta geri eg eisini. Kringvarpslógin krevur, at sjónvarpið ber sakligan og objektivan tíðindaflutning. Ta gjørdi sjónvarpið ikki í mentanarsendingini 6. oktober.

Hvalvíksprestur:

# Samkynd í stríð við skapanarverkið

**Nógv umrøddi presturin úr Hvalvík, Mogens Thilsted Christensen, hevur verið donskum miðlum og sagt sína hugsan um samkynd**

**TOLLYNDI**
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*



*Mogens Thilsted Christensen*

Tað er eftirhondini við at gerast ein fastur táttur, at danskir miðlar seta seg í samband við nógv umrødda danska prestin úr Hvalvík, Mogens Thilsted Christensen, tá etisk mál eru á breddanum í Føroyum.

Danskir miðlar hava seinastu dagarnar endurgivið søguna um harðskap, sum verður framdur móti samkyndum í Føroyum, og seinnapartin hevur hvalvíksprestur sagt sína hugsan í Danmark Radio.

Mogens Thilsted Christensen hevur fleiri ferðir gjørt vart við, at hann heldur tað er eitt stórt mistak at geva teimum samkyndu innivist í revsilógini, og harðskapurin móti teimum samkyndu í Føroyum tykist ikki hava fingið hvalvíksprest at leggja á annan bógv.

- Føroyar eru eitt skilagott og gamaldags samfelag, har Guds orð fyllir nógv. Tað er í stríði við skapanarverkið og gamla testamenti, at tvey av sama kyni liva saman. Guds orð sigur, at tað eru maður og kvinna, sum eiga at liva saman og ikki tvey av sama kyni, sigur Mogens Thilsted Christensen við Danmark Radio

# Dómur fellur í dag

**Í nevningatinginum, sum hevur verið uppi í Mjørkadali seinastu dagarnar, fara nevningarnir í morgun í eitt rúm fyri seg sjálvar at gera av, um ákærdi filipinarin er sekur í øllum ákærunum, nøkrum ákærum ella ongum.**

**RÆTTARMÁL**
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

Í málinum um dekkarin, sum er ákærdur ætla at drepa skiparan á Tórsvík, fellur væntandi dómur í morgun. Tá fer dómarin at geva nevningunum ein samandrátt av tí, sum ákærin og verjin søgdu í nevningartinginum í gjár, tá dómsviðgerðin var í fýra tímar. Síðani fara nevningarnir í eitt rúm fyri seg sjálvar at gera av, um ákærdi maðurin er sekur í øllum ákærunum, nøkrum ákærum ella ongum.

Sambært Dimmalætting, hevur danska rætslæknaráðið staðfest, at filipinarin Romeo Galgo Tibobos er skizofrenur og helst var tað, tá ið skaðatilburðurin var.

Í dag verður spurningurin eisini svaraður, um tað ber til at tamba sjómanslógina so nógv, at til ber at døma fyri uppreistur, myttarí, umborð á skipi, hóast bara ein maður gjørdi uppreistur?

Ein ákæra móti manninum er um uppreistur, ella myttarí, sum uppreistur á skipi vanliga verður róptur. Sjómanslógin sigur ikki, hvat eitt myttarí umfatar, men vanliga fatanin er og var, at fleiri taka seg saman um at gera myttarí.

Men nú tøknin er vorðin so framkomin, at eitt fólk saktans kann stýra einum skipi, er vert at royna, um ikki eisini tað kann myttarí, tá bara ein í manningini ger uppreistur. Øll fimm vitnini, allir sjómenn, brúktu orðið myttarí um tað, sum dekkarin á Tórsvík gjørdi 28. juni í fjør, sigur ÚF.

Sambært ákæruvaldinum kundi maðurin fingið átta til tíggju ára fongsulsrevsing, um til bar at døma í fongsul.

Sambært Dimmu er kravið hjá ákæruvaldinum at fáa hann útvístan. Romeo hevur ongantíð havt uppihaldsloyvi í Føroyum og verður hann helst vístur av landinum í minsta lagi fyri fimm ár. Kravið hjá ákæruvaldinum er, at maðurin skal á sjúkrahús fyri sinnissjúk. Verður hetta dómurin, fer hann í fyrsta umfari væntandi á sjúkrahús í Danmark.

»SHARK ATLANTIC 2006«:

# Ein móti einum – maðurin og dýrið

**HEMARAKAPPING**

Nýskapandi hemarakappingin, sum hevur verið tvey tey seinastu árini, er nú komin í fasta legu og hevur fingið sítt egna navn – "Shark Atlantic". Hesa ferð er kappingin frá 1. november 2006 til 1. mars 2007, og sum áður er Magni Blástein fyriskipari.

Farnu kappingarnar hava verið sera væl umtóktar, tí fátt er so spennandi og hugvekjandi sum at veiða hemara - hetta stóra og sterka dýrið í dýpinum. Einasti reiðskapur er tráða, tí veiðihátturin er sjálvandi líka einfaldur og frumkendur sum spenningurin sjálvur. Og tað eru ikki smákykt, ið bjóða tær av, tí hemari liggur ofta millum 200 og 400 pund og kann gerast yvir tríggjar metrar langur.

Shark Atlantic 2006 er opin fyri øll, sum bera ævintýrið í barmi - føroyingar sum útlendingar. TRYGD er høvuðsstuðul fyri tiltakinum og letur virðislønir á 40.000 kr. Av teimum strýkur vinnarin avstað við 25.000. Við stuðli sínum vil TRYGD vísa á stóra týdningin av at menna nýggjar, føroyskar vinnumøguleikar, ið eru áhugaverdir og mennandi fyri bæði luttakarar og ferðavinnuna. Og júst Shark Atlantic er dømi um tiltak, ið TRYGD heldur kann birta upp undir eina heilt serliga vinnu í Føroyum, ið bæði útlendingar og ikki minst føroyingar sjálvir kunnu fáa stóra gleði av, bæði til likams og sálar.

**Um Shark Atlantic 2006:**

| | |
|---|---|
| Fyriskipari: | Magni Blástein |
| Høvuðsstuðul: | TRYGD |
| Virðisløn: | 25.000 kr. |
| Veiðutíð: | 1. november 2006 - 1. mars 2007 |
| Veiðuøki: | Allastaðni kring oyggjarnar |
| Reiðskapur: | Tráða |
| Vinnarafiskur: | Tyngsti hemari (mynd av fongi og veiðumanni/kvinnu skal takast) |
| Tilmelding: | Magni Blástein, tlf. 581582, tpa. HYPERLINK "mailto:magniblastein@kallnet.fo " magniblastein@kallnet.fo |
| Luttøkugjald: | 500 krónur |